# Spælimenn og globala upphitingin




Arkið við glataðu spælimonnunum hevur Óli P. Teknað




Edward Fuglø hevur lagt útgávuna „Global Warming" til rættis

Mánadagin 23. februar gevur Postverk Føroya út nýggj frímerki. Eitt smáark við átta frímerkjum, sum ímynda skaldsøguna hjá Williami Heinesen, Glataðu spælimenninir, og eitt smáark og tvey frímerki við heitinum „Global Warming".

Arkið við glataðu spælimonnunum hevur Óli P. teknað, meðan Edward Fuglø hevur lagt útgávuna „Global Warming" til rættis.

Skaldsøgan Glataðu spælimenninir frá 1950, ið er uppbygd av fýra satsum eins og eitt tónaverk, er eitt høvuðsverk hjá Williami Heinesen og er týdd til mong mál. Hon kom út á føroyskum í 1975 í týðing eftir Heðin Brú. Søgan fer fram fyri og eftir aldaskiftið 1900 í einum lítlum býi, ið minnir nógv um Havnina, skrivar Turið Sigurðardóttir professari m.a. í sambandi við frímerkini um Glataðu spælimeninar.

Bogi Hansen, havfrøðingur, skrivar m.a. í sambandi við frímerkini um globalu upphitingina:

Veðurlagið á jørðini er í ferð við at broytast, og tað er av mannaávum. Tað ber ikki til at steðga heimsins veðurlagsbroytingum í einum. Vit hava órógvað javnvágina í veðurlagnum, og tað tekur tíð at rætta hana upp aftur. Ein bilur heldur fram eina góða løtu aftan á, at tú trýsti á bremsuna, og soleiðis er eisini við veðurlagnum. Tað er neyðugt at trýsta á bremsuna, áðrenn vandin er heilt eyðsýndur. Og tað ber til at bøta tær ringastu avleiðingarnar. Fáa vit steðgað vøkstrinum í útláti av koldioxidi og øðrum líknandi evnum, so verða avleiðingarnar seinni í hesari øldini ikki so ógvisligar.

Virðini á frímerkjunum eru 6,00 og 8,00 kr.

*mg*

---

# Framsýning á Húsarhaldsskúlanum



*Sum nakað nýtt skipa næmingarnir fyri eini spennandi mótasýning*

Framsýning av handarbeiði, mótashow, café og opið hús verður á Húsarhaldsskúla Føroya í Klaksvík týsdagin 24. februar.

Skeiðið á Húsarhaldsskúla Føroya er við at verða liðugt, og í tí sambandi skipa næmingarnir á skúlanum fyri stórari framsýning við tí handaliga arbeiðinum, sum teir hava gjørt. Sum nakað nýtt hava næmingarnir eisini skipað fyri eini spennandi mótasýning.

Undirvíst hevur verið í h andarbeiðslærugreinunum: binding, tilskering, seyming, patchwork, silkimáling, brodering og føroysk bond.

Á framsýningini verður eisini høvi hjá teimum vitjandi at fara á cafe, fáa ein góðan køkubita, sum næmingarnir hava bakað afturvið einum góðum kaffimunni.

Sum nakað nýtt verður opið hús, har tey vitjandi, kanska serliga komandi næmingar og foreldur teirra, kunnu fáa meira at vita um skúlan.

Framsýningin er opin týsdagin 24. februar frá kl. 16.00 – 21.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

*mg*